# FLAGGDAGURIN FYLLIR

**SUNNUDAGIN** ERU LIÐIN **70 ÁR**, SÍÐAN BRETSKA **HERSETINGARVALDIÐ** Í FØROYUM **25. APRÍL** Í 1940 GÓÐKENDI, AT **FØROYSK** SKIP KUNDU SIGLA VIÐ **MERKINUM** Í HÚNAR HÁTT. STÓRUR IVI VALDAÐI UM **FLAGGSPURNINGIN**, EFTIR AT TÝSKARAR HØVDU HERTIKIÐ **DANMARK** 9. APRÍL, OG BRETAR HØVDU SETT **HERFÓLK** Á LAND Í **FØROYUM** 13. APRÍL. **AMTMAÐURIN** VILDI IKKI GÓÐKENNA FØROYSKA **FLAGGIÐ**, BRETSKI **KONSULIN** ÆTLAÐI AT LATA **FØROYINGAR** SIGLA VIÐ GRØNUM OG HVÍTUM FLAGGI, MEN FØROYINGAR **KRAVDU** AT SLEPPA AT SIGLA VIÐ **MERKINUM**



**FLAGGDAGUR**
Uni Arge
uniarge@gmail.com

Farnu vikurnar hevur nógv verið gjørt burturúr, at 70 ár eru liðin, síðan týskarar hersettu Danmark og Noregi 9. apríl í 1940, og bretar settu herfólk á land í Føroyum 13. apríl. Bretar kundu ikki lata Týskland hertaka Føroyar, og tí var Winston Churchill skjótur at kunngera í bretska undirhúsinum 11. apríl í 1940, at Bretland ætlaði at hertaka Føroyar og lata Danmark oyggjarnar aftur eftir krígslok.

Umboð fyri bretska hersetingarvaldið komu til Føroya longu 12. apríl í 1940. Tveir bretskir oyðarar komu stutt eftir døgurða hendan dagin inn um Borðuna og kastaðu akker kl. 12.30. Ein tíma seinni kom bátur í land við tveimum heryvirmonnum. Teirra ørindi vóru at hitta amtmannin, og tá teir komu á gátt hjá honum, var Kristian Djurhuus, løgtingsformaður, staddur har.

Bretsku yvirmenninir váttaðu inni hjá amtmanninum tað, sum Churchill hevði sagt í undirhúsinum, at Bretland ætlaði at hertaka Føroyar og lata tær aftur, tá Danmark var vorðið frælst. Bretarnir bóðu um, at myndugleikarnir í Føroyum fóru at fyrireika seg at taka ímóti 250 hermonnum í Havn og á Skálafirði, og at skipað varð fyri at sensurera telegraf, telefon og brævapost.

Dagin eftir, tann 13. apríl í 1940, kveittu fólk út í havsbrúnna at vita, hvussu var statt við bretsku hermonnunum. Klokkan 15.00 komu ein krússari, tveir oyðarar og tveir vápnaðir trolarar til sjóndar við Borðuna. Skipini stevndu inn á Havnina, har krússarin og báðir trolararnir løgdu stilt. Í land komu Sandall, oberstur, og nýggi bretski konsulin í Føroyum, Frederick C. Mason. Hersetingin í Føroyum var veruleiki.

### Óvissa um umstøðurnar

Føroyingar fegnaðust um, at tað vóru bretar, sum komu til Føroya, og ikki týskarar, men hersetingin hevði við sær, at nógv óvissa tók seg upp um fleiri viðurskifti. Løgtingið mótmælti formliga, at Føroyar vórðu hersettar, tí tað vildi halda Føroyar uttanveltaðar í krígnum, men tingið ásannaði samstundis, at sum umstøðurnar vóru, var hersetingin í lagi.

Ivi tók seg upp um, hvørja heimild amtmaðurin hevði í landinum, nú sambandið við Danmark var kvett, og hvørja støðu løgtingið hevði. Frammanundan hevði løgtingið virkað ráðgevandi í lóggávuspurningum, og danski ríkisdagurin samtykti lógirnar. Nú fekk løgtingið heimild at samtykkja lógir, men amtmaðurin skuldi taka undir við teimum og kunngera tær.

Spurningurin um flaggið kom eisini á breddan. Flaggspurningurin hevði verið eitt heitt evni í fleiri ár, ikki minst í 1930, tá danski forsætisráðharrin, Thorvald Stauning, á Tingvøllum í Íslandi hevði kravt at fáa føroyska flaggið strikað, tí tað var ikki góðkent flagg. Rokið gjørdist ikki minni, tá tjóðskaparsinnaðir føroyingar svaraðu aftur á ólavsøku sama ár við at kvetta Dannebrog niður av tinghúsinum og hongja Merkið út av vindeyganum.

Summi føroysk skip høvdu siglt við Merkinum áðrenn 1940, tí tey høvdu hug til tess, men einasta alment góðkenda flagg føroyinga fyri 1940 var danska flaggið. Við hersetingunum í Danmark og Føroyum broyttust umstøðurnar tó fullkomiliga. Bretar vildu ikki, at føroyingar skuldu sigla við donskum flaggi, tí týski figgindin hevði hersett Danmark. Teir kravdu tí, at føroyingar strikaðu Dannebrog.



### Skipini strika Dannebrog

Fyrsta skipið, sum eftir hersetingina í Danmark strikaði danska flaggið, gjørdi tað av sínum eintingum. Hetta skipið var miðvágstrolarin »Nýggjaberg,« sum Mortan J. Mortensen á Argjum førdi. Hann var komin norður um Pentlandsfjørðin, tá tíðindini um hersetingina í Danmark bórust 9. apríl, og strikaði beinanvegin Dannebrog. Í húnar hátt fór Merkið í staðin.

Tann 12. apríl í 1940 fór sluppin »Eysturoy« av Klaksvík til Aberdeen undir donskum flaggi. Skiparin, Hans Mikkelsen, greiddi frá, at tann 13. apríl komu teir suður ímóti Orknoyggjunum, har eitt bretskt vaktarskip steðgaði teimum. Yvirmenninir á vaktarskipinum bóðu teir strika Dannebrog, tí teir høvdu ikki loyvi at sigla við tí. Skiparin spurdi, um hann kundi vinda føroyska flaggið á stong, og tað var í lagi.

Leiðin gekk nú fyrst til Kirkwall í Orknoyggjum og síðan til Aberdeen, hagar »Eysturoyggin« sum fyrsta føroyska skipið við føroyskum flaggi á stong kom 16. apríl. Í Aberdeen spurdu myndugleikarnir, um føroyingarnir vildu hava føroyskt ella bretskt flagg. Teir vildu hava føroyskt. Síðan vórðu føroysk fløgg málað á síðuna, og flaggið umborð fór í land at seyma